# SÁTTMÁLI

Millum undirritaðu

Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
(í sáttmálanum nevnd "*fakfeløgini*")

øðrumegin og

Føroya Arbeiðsgevarafelag (í sáttmálanum nevnd "*FAG*")

hinumegin

er í dag gjørdur hesin sersáttmáli.

§ 1

Øki sáttmálans

Sáttmálin fevnir um øll arbeiðsfólk, sum starvast á uppisjóvarvirkjum, herundir eisini innan landing og avskiping (í løtuni P. P. Faroe Pelagic, Varðin Pelagic og Pelagos).

§ 2

Lønarásetingar

Stk. 1. Partarnir eru samdir um, at tímalønin fyri allar tímar í samdøgrinum, mánadag til og við fríggjadag (mánamorgun kl. 00.00 til fríggjadag kl. 24.00) verður kr. 188,26 [1] um tíman, og er hetta galdandi uttan mun til, hvussu vaktirnar eru skipaðar, ella um arbeitt verður vanliga normaltíð.

Stk.2. Um arbeiðsfólk arbeiðir longri enn 12 tímar á vaktini yrkadagar, verður fyrstu tríggjar tímarnar aftaná goldin leygardagsløn sambært stk. 3. Fylgjandi tímar verður goldin sunnu- og halgidagsløn sambært stk. 3
Um arbeiðsfólk arbeiðir longri enn 12 tímar á vaktini leygardag, verður goldin leygardagsløn sambært stk. 3 + 35%

[1] 1. mai 2024: kr. 188,26 og 1. mai 2025: kr. 197,77

Um arbeiðsfólk arbeiðir longri enn 12 tímar á vaktini sunnudag, verður goldin sunnudagsløn sambært stk. 3 + 35%

Stk. 3. Fyri arbeiði leygar- sunnudag og aðrar halgidagar umframt frídagar sambært sáttmálanum millum fakfeløgini og FAG, verður lønin, sum ásett í sáttmálanum millum fakfeløgini og FAG, herundir galdandi yvirtíðartakstir. Tímalønin er pr. 1. mai 2024 kr. 253,19,[2] fyri leygardagar og kr. 306,90[3] fyri sunnu- og halgidagar.

Stk. 4.. Tá fólk skifta frá dag til náttarvakt (ella øvugt) skal hetta gerast yvir 24 tímar, soleiðis at fólk fáa frí í minsta lagi 24 tímar millum vaktarskiftini.

Um fólk ikki fáa frí í minsta lagi 24 tímar millum vaktarskiftini verður, fyri fyrstu vaktina eftir vaktarskiftið, goldin tvífald tann løn, sum annars skuldi verið goldið fyri hesa vakt.

Tó skulu ongantíð vera minni enn 12 tímar ímillum at fólk skifta frá dag- til náttarvakt ella øvugt.

Stk. 5. Harumframt skal gjaldast starvstíðarviðbót sambært teimum til eina og hvørja tíð galdandi takstum í sáttmálanum millum fakfeløgini og FAG

Stk. 6. Arbeiðsfólk, ið eru til arbeiðis, hóast ongin framleiðsla er á virkinum, verða lønt sambært høvuðssáttmálanum. Henda áseting er galdandi frá einum samdøgri aftaná at framleiðsla endar ella til liðugt er at rigga av og vaska aftaná framleiðsluna, til eitt samdøgur áðrenn nýggj framleiðsla byrjar.

Hendan áseting er ikki galdandi tá talan er um landing ella avskiping.

Stk. 7. Partarnir eru samdir um, at lønin framyvir hækkar við sama prosentstigi, sum lønin hækkar í samráðingunum millum fakfeløgini og FAG um sáttmálaviðurskiftini á privata arbeiðsmarknaðinum.

Stk. 8. Um arbeiðsfólkið ynskir tað, og fakfeløgini skrivliga góðtaka hetta, so kann lønin ásetast til kr. 174,69[4] pr. tíma á dagvaktini (frá kl. 08.00 – 20.00) og kr. 201,82,[5] pr. tíma á náttarvaktini (frá kl. 20.00 – 08.00) frá mánadegi kl. 00:00 til fríggjadag kl. 24:00.

§ 3

Summarfrí

Viðvíkjandi summarfrí verður víst til galdandi frítíðarlóggávu.

§ 4

Aðrar ásetingar

[2] 1. mai 2024 : kr. 251,03 og 1. mai 2025: kr. 262,23
[3] 1. mai 2024: kr. 303,18 og 1. mai 2025: kr. 316,32
[4] 1. mai 2024: kr. 174,69 og 1. mai 2025: kr. 183,71
[5] 1. mai 2024: kr. 201,82 og 1. mai 2025: kr. 211,72

Stk. 1. Har aðrar ásetingar ikki eru gjørdar í hesum sersáttmála, so eru ásetingarnar í sáttmálanum millum fakfeløgini og FAG galdandi, herundir ásetingarnar um eftirlønargjøld, limagjøld og aðrar ásetingar. Viðbót fyri sildaarbeiði verður tó ikki galdandi fyri hendan sáttmála.

Stk. 2. Viðvíkjandi ásetingini um upplýsingar til arbeiðsfólk um nær arbeiði byrjar (§ 9 í høvuðssáttmálanum), so skal freistin sambært hesum sáttmála vera 8 tímar. Um serlig viðurskifti eru, t.d. fólk ikki møtir til arbeiðis vegna sjúku, so er nevnda 8 tíma freist ikki galdandi, tá onnur fólk skulu boðsendast til arbeiðis.

§ 5

Gildisskeið og ætlanarlýsing

Gildiskoma og uppsøgn fylgir høvuðssáttmálanum.

§6

Sáttmálaeintøk

Hesin sersáttmáli verður undirskrivaður í fimm einsljóðandi eintøkum og fær hvør partur sítt eintak.

Tórshavn, tann 9. juni 2024

__________________________
Føroya Arbeiðarafelag

__________________________
Føroya Arbeiðsgevarafelag

__________________________
Havnar Arbeiðarafelag

__________________________
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag

__________________________
Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag